# Calvin Clarke bukar slagverk í Føroyum

**Enski percussionisturin Calvin Clarke vitjar nú í Føroyum. Hann er m.a kendur frá danska DJ Alligator Project, sum var í Føroyum fyrst í hesum árinum**

UNDIRHALD
*Ingrid Bjarnastein*



Calvin Clarke hevur verið á ferð runt í heiminum við DJ Alligator, og hava teir framført á nøkrum av teimum størstu diskotekunum í Europa. Calvin Clarke spælir percussion (slagtól), og hevði hann ein stóran leiklut í framførsluni hjá DJ Alligator.

Clarke er nú komin til Føroya, hesuferð einsamallur. Hann fer at hava tvær framførslur; eina í Suðuroy og eina í Platform í Havn. Møguleiki er at uppliva hittini, sum vit kenna tey, frískað upp við trummum »live« á pallinum.

Sagt verður, at ongin er førur fyri at standa í frið, tá Clarke slær á ljóðfør síni, sum »Calvin Live On Bongos«

Clarke spælir á bongos, congas, timballes, rotar drums og snears.

Fríggjakvøldið 28.09.01 verður stórt show og diskotek í TB-húsinum á Tvøroyri við »Calvin Live On Bongos«

Leygarkvøldið 29.09.01 verður sama framførsla at síggja í Platform í Havn. DJ er Ottar »Skottar« úr Føroyum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av eystri, um kvøldið upp í stívt andøvsgul. Møguliga okkurt ælið, annars sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og kanska okkurt ælið norðanfyri, annars sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landsynningi og regn av og á. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 15 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 12 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | – |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 19 |
| Róm | – |
| Malorca | 26 |
| Athen | 30 |
| Malta | – |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | 26 |
| New York | 24 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur frá Grønlandi til Suður-Skandinaviu stendur mestsum í stað, men viknar.




Hátrýstryggurin yvir Føroyum viknar og eitt lágtrýst vestan fyri Írland dýpist. Brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar um vikuskifti.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/09 kl. 06[00]– 25/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,4°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/09 kl. 06[00]– 25/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 47,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

24. sept.: Fyrra kvarter
29. sept.: Mánin longst frá jørðini
2. okt.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. sep | 03.10 | 15.34 | 02.10 | 14.34 | 02.25 | 14.49 | 05.10 | 17.34 | 06.10 | 18.34 | 01.25 | 13.49 | 00.25 | 12.49 | 03.25 | 15.49 | 04.25 | 16.49 | 02.55 | 15.19 | 04.10 | 16.34 |
| 27. sep | 03.58 | 16.21 | 02.58 | 15.21 | 03.13 | 15.36 | 05.58 | 18.21 | 06.58 | 19.21 | 02.13 | 14.36 | 01.13 | 13.36 | 04.13 | 16.36 | 05.13 | 17.36 | 03.43 | 16.06 | 04.58 | 17.21 |
| 28. sep | 04.44 | 17.05 | 03.44 | 16.05 | 03.59 | 16.20 | 06.44 | 19.05 | 07.44 | 20.05 | 02.59 | 15.20 | 01.59 | 14.20 | 04.59 | 17.20 | 05.59 | 18.20 | 04.29 | 16.50 | 05.44 | 18.05 |
| 29. sep | 05.27 | 17.48 | 04.27 | 16.48 | 04.42 | 17.03 | 07.27 | 19.48 | 08.27 | 20.48 | 03.42 | 16.03 | 02.42 | 15.03 | 05.42 | 18.03 | 06.42 | 19.03 | 05.12 | 17.33 | 06.27 | 18.48 |




BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT Spf.
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo